


*Nr. 7* *6. apríl 2014* *74. árg.*

# Á ferð niðan til Jerusalem

*Men teir tóku ikki ímóti honum, av tí at hann var á ferð til Jerusalem.*
*Luk. 9,53.*

"Sí, vit eru á ferð niðan til Jerusalem," segði Jesus við lærusveinarnar, og teir skiltu hann ikki. Teir hómaðu ósigurin og stúrdu fyri tí ringasta. Hansara ætlan var beint ímóti hugsanum teirra, og teir skiltu ikki, at ætlan hansara var tann rætta.

Soleiðis er tað framvegis. Hvat skulu vit við kristindóminum? Hvør dugur er í honum? Hvussu skulu vit fáa hjálp at klára dagin og vegin, av tí at ein maður fyri skjótt tvey túsund árum síðani hevði Jerusalem sum mál fyri ferð síni? Vit nokta ikki fyri, at trupulleikarnir mangan vaksa okkum upp um høvdið. Vit kunna bara ikki við okkara besta vilja skilja, at nøkur meining er í at grunda yvir tað, sum hendi, tá ið Jesus fór niðan til Jerusalem og varð dømdur til deyða.

Nei, tað skiltu tey heldur ikki tá. Men lat okkum eina løtu síggja sakina frá hinari síðuni. Hvussu ber tað til, at milliónir av menniskjum í dag boyggja síni knø og takka Gudi fyri, at Jesus gekk ferðina at enda? Hví verða vit aldri liðug at tosa og syngja um krossin á Golgata? Hvussu ber tað til, at orð Bíbliunnar um Jesu líðingar og deyða hava givið túsundum og aftur túsundum frið og kraft og hava givið listafólkum íblástur at skapa tað vakrasta og hægsta? Her má vera eitt loyndarmál, sum hevur uppiborið eina grundiga umhugsan.

Frágreiðingar duga ikki. Sum so mangan, tá ið vit møta tí største, snýr tað seg um eitt val. "Fylg mær!" sigur Jesus, og í fylgi við honum fáa vit eyga á samanhangin. Burturfrá síggja vit bara ein einsamallan ferðamann á veg niðan til Jerusalem. Men halda vit okkum nær at honum, verða eygu okkara upplatin. Í fótasporum

hansara varnast vit, at vegur hansara er friðarinnar vegur, hóast stríð; hann er lívsins vegur, hóast kross og deyða. ”Fylg mær!” sigur hann. Hjálp okkum, Harri Jesus, at fylgja tær allan vegin, fet fyri fet, dag eftir dag – heilt á mál.

*Krist, tú á krossinum bart á tær*
*menniskjans synd og neyð!*
*Krist, tú á krossinum keypti mær*
*frælsi frá dóm og deyð!*

*Har við tín kross rætti himna Gud*
*hond til ta falnu sál;*
*har við tín kross fann eg dýran lut:*
*lívið og lívsins mál!*

# ”Tá kom Jesus…”

*Jóh. 20,19 og 26*

Hann kom til ræðsluslignar lærusveinar og til ein Tummas, sum ikki fekk seg at trúgva, at Jesus var upprisin. Bíblian er full av frásøgnum um menniskju, sum møta Jesusi:

Har var ein Pætur, sum hevði sýtt fyri at kenna Jesus. Hann fekk eina serliga heilsan frá Meistaranum sjálvum.

Lærusveinarnir høvdu givið skarvin yvir og vóru farnir út at fiska. Teir møta Jesusi niðri í fjøruni, har hann stóð og bíðaði eftir teimum. Mistreystið vendist til gleði, og teir fingu nýtt treysti.

Jairus við sínari deyðasjúku dóttur møtir Jesusi og sleppur at uppliva, at Jesus ger dóttrina fríska.

Hvussu ofta kunnu tú og eg eftir at hava hugsað okkum um siga: ”Tá kom Jesus”? Er tað, sum vit hava upplivað, vert at siga øðrum?

Alt broytist, tá ið Jesus kemur.

Hann ynskir at náa til hin einsliga, tí hann er hjálpari teirra einsligu.

Hann ynskir at grøða hin sjúka, tí ”við sárum hansara eru vit grødd.” Jes. 53,5.

Hann ynskir at náa til hin móða, tí ”hann gevur hinum maktaða megi og hinum máttleysa mikla styrki.” Jes. 40,29.

Hann ynskir at koma til hin útstrídda, tí sigur hann: ”Komið higar til mín øll tit, sum arbeiða og ganga undir tungum byrðum, og eg vil veita tykkum hvílu.” Matt. 11,28.

Hann er tín og mín uggi, tín og mín vón og framtíð okkara.

*Tore Bergum.*
*Effie Campbell* umsetti.

# Bjarga dóttur míni

*Og ein av forstøðumonnunum, Jairus nevndur, kemur; og tá ið hann sær hann, fellur hann honum til fóta, og biður hann bønliga og sigur: „Lítla dóttir mín liggur og stríðist. Hevði tú viljað komið og lagt hendurnar á hana, at hon má sleppa undan og liva!”*

*Mark. 5,22-23.*

”Gomul skulu doyggja, og ung kunnu doyggja,” verður sagt. Tað er helst rætt, og tað var júst tað, sum hendi við dóttrini hjá forstøðumanninum, eini 12 ára gamlari gentu. Hon hevði fingið eina ringa sjúku, og tá ið Jesus endiliga kemur vegin fram til húsini hjá Jairusi, er gentan deyð. Hjá Jesusi, sum í sambandi við eitt annað andlát kallar seg "uppreisnin og lívið" er deyðin tó ongin forðing.

Fyri okkum og fyri teir dugnaligastu læknarnar er tað ov seint, tá ið deyðin hevur verið á gátt. Tá er ongin vegur aftur. Har standa vit so mangan púra máttleys, annaðhvørt talan er um eitt ungt ella eitt gamalt menniskja. Men soleiðis er ikki við Jesusi. Hann er Harri yvir lívi og deyða. Orð hansara skapa nýtt lív. Í hondum hansara er alt - heilt úr djúpastu dølum og upp á hægstu tindar. Hann hevur alt vald í himni og á jørð.

Bæði dóttir Jairusar og Lásarus, sum Jesus eisini hevði vakt upp frá deyðum, doyðu aftur seinni. Øll skulu vit doyggja, tí løn syndarinnar er deyði. Men har er eittw "men." Jesus hevur goldið løn syndarinnar og vann við uppreisn síni páskamorgun á øllum oyðandi kreftum. Tí er vón fyri øll okkum deyðiligu. Um Jesus ikki er afturkomin áðrenn, skulu vit øll rísa upp á evsta degi og fylgja honum til lívsins land, um vit í lívi og deyða í trúnni hildu okkum til hansara og hansara lívssælu orð. Vit hava sum kristin eina framtíð og eina vón, eina livandi vón, sum sjálvt ikki deyðin kann taka frá okkum.

*Tó eg skal sum blóman følna,*
*barmur mín og hond skal kólna,*
*trúgvi eg, tín hond meg hevur*
*og í deyða lív mær gevur,*
*tú breytst deyðans beiska brodd.*

*Nú er krossins gáta rós mítt,*
*frelsari, lat náðarljós títt,*
*lýsa mær á lívsins vegi,*
*leiða meg á deyðadegi,*
*heim í paradís við tær.*

---

Hevur tú sagt børnum tínum, at Jesus er hin einasti, sum kann frelsa tey fyri ævinleikan?

e.c. ums.

# Søgan um George McCluskey

*”Hevja til hans tínar hendur fyri lív barna tína ...” Harmaljóð 2,19.*

Tá ið George McCluskey giftist, gjørdi hann av at brúka ein tíma hvønn dag at biðja, tí hann vildi, at børn hansara skuldu vaksa upp og fylgja Kristusi. Seinni økti hann um bønina og fór at biðja fyri abbabørnum og langabbabørnum. Hvønn dag frá 11-12 bað hann fyri teimum trimum ættarliðunum eftir hann sjálvan.

Sum árini gingu, góvu báðar døtur hansara Jesusi lív sítt, og tær giftust við monnum, sum tæntu í kirkjuni. Hesi tvinni hjúnini fingu fýra døtur og ein son. Allar fýra døturnar giftust við hvør sínum kirkjutænara, og sonurin gjørdist prestur.

Tey bæði fyrstu børnini í tí ættarliðnum vóru báðir dreingir. Tá ið hesi bæði systkinabørnini fóru á hægri læristovn, fingu teir sama kamar. Annað árið, teir gingu har, gjørdi annar drongurin av at gerast prestur. Tað gjørdi hin ikki. Hann kendi uttan iva eitt trýst á sær at halda fram við familju-siðvenjuni; men hann valdi staðin fyri at fylgja sínum egna áhuga fyri sálarfrøði.

Hann fekk sítt doktaraheiti og fór undir at skriva bøkur fyri foreldur. Hesar bøkur gjørdust metsølubøkur. Hann fór eisini undir eina útvarpssending, sum verður send út um allan heimin hvønn dag. Hvussu eitur hann? James Dobson, og útvarpssendingin kallast ”Focus on the Family”.

So nú kennir tú søguna hjá George McCluskey! Hann var bara ein vanligur maður; men bønir hansara fingu ávirkan á ein stóran part av heiminum. Orðið til í dag ljóðar til foreldur og ommur og abbar: ”Statt upp og vena á nátt í byrjanini á hvørji náttarvøku, oys út títt hjarta sum vatn fyri ásjón Harrans, hevja til hans tínar hendur fyri lív barna tína ...” Harmaljóð 2,19.

“... et Ord til Dagen”
*Effie Campbell* umsetti.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 6. apríl. | Tekstur: | Matt. 18,21-35 | bíbliuorð: | Matt. 6,12 |
| 13. apríl. | Tekstur: | Luk.19,28-40 og Mark.15,16-37; | bíbliuorð: | Matt. 21,5 og Jóh. 3,16 |
| 20. apríl. | Tekstur: | Mark. 16,1-15; | bíbliuorð: | Mark. 16,15b |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74




**Nr. 8** **20. apríl 2014** **74. árg.**

# Jesus livir

”Hann er risin upp.“ Sum ein klettur stendur hesin veruleikin við sínum bjarta ljósi mitt í heimssøguni, at einaferð livdi ein maður her á jørð, sum varð róptur Jesus úr Nasaret, og sum vann á deyðanum, ið annars kundi vinna á okkum øllum.

Ikki havi eg tølur á, hvussu mangar ferðir tað ígjøgnum árini hevur verið sagt, at Jesus er deyður, og ein deyðsváttan er skrivað. Eisini í okkara tíð eru ávísir „klókir“ professarar, sum stuttleika sær við at rópa Jesu uppreisn eina mýtu ella eina dreymamynd, sum nakrar kvinnur og nakrir óupplýstir menn hava billað sær inn var ein veruleiki.

Sanniliga vóru rómversku hermenninir um at svíma av ræðslu, tá ið teir sóu eingilin, sum rullaði steinin frá, og grøvin var tóm. Teir leigaðu nakrar prestar at lúgva um hendingina, og aldri varð Jesu likam funnið. Men sjálva uppreisnina, tá ið Harrin sum sigursharri gekk út í ljósið, hevur sjálvandi onki menniskja sæð. Tí sluppu heldur ikki heidningurin Pilatus ella ein lygnari sum Kaifas at síggja tann upprisna. Men í døgunum, sum aftaná komu, sóu vinir hansara hann, og ert tú greiðir um, at tað eisini er hent í okkara tíð?

Vit vita, at Jesus livir og fór undan okkum inn í Himmalin, og hann læt dyrnar standa opnar eftir sær fyri ein og hvønn, sum trýr.

*Heiður tær veri, Harri, sum á deyða vann!*
*Páskaboð nú beri: Deyðin bana fann!*
*Ljósar lógu lundir, sí, ein eingil kom,*
*læt upp gravargrundir, Jesu grøv er tóm!*

# Vit høvdu vónað

Næstan onki verri kann henda eini menniskju, enn at alt, sum hon lítur á, hoyrir fortíðini til. Men júst tað var støðan hjá teimum báðum, sum seinnapartin páskadag vóru á veg til Emmaus.

Teir høvdu hoyrt um Jesus úr Nasaret, og tann boðskapurin hevði gripið teir. Men nú var hann deyður og burtur – og hvat nú? ”Vit høvdu vónað, at hann var tann, ið skuldi loysa út Ísrael.”

Men so kom tann upprisni í fylgi við teimum. Tað var ikki júst soleiðis, at honum tókti synd í teimum, men heldur átalaði hann teir. ”O, tykkara óvitigu menn og seinføru í hjarta til at trúgva! Alt er júst hent soleiðis, sum skrivað stendur.”

Seinni, tá ið teir í fylgi við Jesusi vóru komnir inn í bygdina, og hann settist til borðs saman við teimum og vælsignaði og breyt breyðið, kendu teir hann aftur – og frá teirri løtu, settu teir ikki vón sína bara til fortíðina.

Vit høvdu vónað - hjá okkum kann eisini skjótt gangast soleiðis, at alt, sum viðvíkur upprisna Harra og Frelsara okkara, verður so undarliga fjart og óveruligt.

Tá er ikki annað at gera enn at leita aftur til skriftirnar og siga sum teir báðir á veg til Emmaus: ”Verð hjá okkum, tí at tað tekur at kvølda og dagur aftnar,” og síðani finna pláss okkara við borð hansara.

Og so tekur tann upprisni sær av restini.

*Mær tørvar tína hjálp hvønn lívsins dag.*
*Bert náði tín kann doyva fjandans slag.*
*Hvør er sum tú? Í ódn og sólskinsbrá,*
*mín stavur og mín stuðul, ver mær hjá.*

# Í Jesu fótasporum

Jesus sigur: “Haldið saman, elskið hvør annan, talið gott hvør um annan, dømið ikki, talið um, at eg eri ein persónur, sjálvt um eg eri ósjónligur, at eg ongantíð skal fara frá tykkum, eg eri hjá Faðirinum í Himli og biði fyri tykkum, eg biði fyri teimum máttleysu, biði fyri tykkara veiku trúgv, biði, at tit skulu megna at bera evangeliið út til øll menniskju. Gloymið ikki at tala hvør við annan um, at eg komi aftur og taki tykkum til mín. Eg síggi til, at tit fáa ein bústað, so óttist ikki. Hjá mær er eingin harðskapur, eingin svikagerð, eingin maktgirnd.”

LMF-blaðið.
*Effie Campbell* umsetti.

# Tá ið Gud setir sær fyri

*"Eg, Harrin ... skal tala orð og lata tey sannast ..." (Ez. 12,25).*

Tvær møguligar frágreiðingar eru um tað, sum hendi í Swan Quarter í North Carolina í 1876. Annaðhvørt vóru tað teir mest ótrúligu tilburðir, sum hendu samstundis, ella Guds uppílegging - rætt og slætt.

Metodistakirkjan hevði tørv á nýggjum bygningi, og takksamir tóku teir ímóti einum stórum grundøki í Oyster Creek Road. Grundstykkið lá heldur lágt, og tí bygdu teir kirkjuna serliga sterka, og hon varð sett á grundina, sum var úr tigulgróti.

Nakað eftir hetta brast eitt ódnarveður á, og tey, sum sóu yvir á Oyster Creek Road, stóðu bilsin, tá ið tey sóu nakað heilt ótrúligt! Kirkjan kom - enn fullkomiliga óskalað - siglandi oman eftir gøtuni! Vatnflóðin hevði lyft hana av grótgrundini og sent hana avstað. Menn royndu at leggja hana fyri teym og bundu snøri um hana, men kirkjan fleyt víðari. Inni í miðbýnum gjørdi hon, meðan mong menniskju stóðu og hugdu at, eina óskiljandi høgrasnaring og helt síðani beint fram. Á sama avgjørda hátt snaraði hon at enda burtur frá gøtuni, setti kós beint móti einum óbygdum grundøki og steðgaði mitt úti á tí!

Vatnið sjúnkaði so við og við; men kirkjan stendur enn har. Nú eru meir enn 130 ár liðin, síðani kirkjan, sum nú eitur Providence (Forsjón) Methodist Church, av sær sjálvari sigldi yvir á tað grundøkið, sum øll í býnum trákkaðust eftir. Tað løgna er, at tað grundøkið, sum kirkjan sjálv valdi sær, hevði upprunaliga verið tað, sum meinigheitin av fyrstan tíð valdi sær, tá ið tey fóru undir byggiætlanina; men maðurin, sum átti stykkið, Sam Sadler, hevði víst tey frá sær. Morgunin eftir vatnflóðina gav hann presti ognarbrævið upp á stykkið.

"Tí eg eri Harrin ... Tað, sum eg sigi frammanundan, gongur út til ásetta tíð ..." Ez. 12,25 (donsk ums.). Tað er einki at ivast í, at tá ið Gud ger okkurt av, so kann einki forða honum.

"... et Ord til Dagen"
*Effie Campbell* umsetti.

---

Vekingin í Wales byrjaði við, at tríggir ungdómar bóðu: 1. Harri boygg meg. 2. Vek meinigheitina. 3. Frels verðina.

*e.c.* ums.

# Síðsti vitnisburðurin

Í 1960-árunum var páskastevna norðuri í Hvalvík. Katrina, kona Petur á Oyri, var tá høgt uppi í 80 árunum. Hon var skroypilig og sat niðri, tá ið hini stóðu uppi. Tá ið fríur vitnisburður var, fór hon upp á talarastólin og segði: ”Er eingin her í kvøld, sum vil geva Jesusi sítt hjarta?” Tvær døtur hennara stiðjaðu hana niðurav aftur og fóru heim við henni.

Hetta var leygarkvøld. Sunnudagin, 1. páskadag, var øllum greitt, at hon lá til tað síðsta. Klokkan 5 seinnapartin, meðan fólkið sat í kirkjuni, doyði hon. Frammanundan hevði hon sagt við húsfólkið, at tey skuldu fara fram í Missiónshúsið til møtið kl. 8, og tey skuldu bara lata seg liggja.

Ein kona, sum búði úti við neyst, fór á kvøldmøti. Hon visti ikki, at Katrina var deyð. Tá ið hon kemur undir húsini hjá Peturi á Oyri, hoyrir hon so yndisligan sang. Hon heldur, at tað eru børnini hjá Katrinu, sum sita rundan um hana og syngja andaligar sangir. Konan stendur eina løtu í túninum og lurtar, tí hon heldur, at hetta ljóðar so himmalskt.

Tá ið hon kemur fram í Missiónshúsið, sita øll børnini hjá Katrinu á møtinum.

Katrina vitnaði til tað síðsta. Hvussu er vorðið við tær og mær? Jesus hevur glett okkum. Vilja vit gleða Jesus?

*Effie Campbell* umsetti.

---



## SUNNUDAGSBLAÐIÐ

***ynskir øllum einar gleðiligar páskir!***

***Heilsan Blaðstjórin.***



---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 20. apríl. | Tekstur: | Mark. 16,1-15; | bíbliuorð: | Mark. 16,15b |
| 27. apríl. | Tekstur: | Jónas 1-4; | bíbliuorð: | Jón. 2,10b |
| 4. mai. | Tekstur: | 1. Kong.17,1-16; | bíbliuorð: | Luk. 1,37 |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74